# Skrtel skaddur

Liverpool-verjuspælarin Martin Skrtel noyddist av vøllinum við skaða í dystinum í Manchester City í gjár. Nú stúra tey í Liverpool fyri, at hann er álvarsliga skaddur í knænum. Skrtel skuldi í dag til nærri kanningar á sjúkrahúsi fyri at staðfesta, hvussu standurin var í knænum. Martin Skrtel hevur vunnið plássið í miðverjuni hjá Liverpool frammanfyri danan Daniel Agger, sum nú kann rokna við at fáa kjansin aftur.



# Útisetarnir vunnu fyrsta dystin

Manshondbóltur hevur ikki verið á skránni hjá ÍF Føroyum í fleiri ár, men um vikuskiftið varð aftur lagt til brots. ÍF Føroyar komu ikki væl frá byrjan og komu eisini afturúr beinavegin. Mitt í hálvleikinum eydnaðist tað tó at koma á odda, og hálvleiksstøðan var 10-6. Seinni hálvleikur byrjaði sum fyrri, og fleiri ferðir vóru VHC/Vidar við at fáa javnleik. Hetta eydnaðist tó ikki, og móti endanum økti Heini Bendtsen til bæði 18-15 og 19-15 og avgjørdi harvið dystin, sum endaði við 19-16 sigri. ÍF Føroyar hevur eisini eitt kvinnulið har fyrsti dystur verður tann 19. oktober.

B71-B68 2-2 (1-1):

# Nú stendur á hjá B71



*Enn livir vónin hjá B71 og Gudmundi Nielsen, men kravið er nú so klokkuklárt, at teir skulu hava seks stig av seks møguligum seinastu umførini*

*savnsmynd*

**Møguleikarnir vóru til staðar. Men tað gekk so slettis ikki eftir vild hjá B71, sum nú hevur krav um seks stig í seinastu báðu dystunum, um nøkur vón skal vera at bjarga sær**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*B71*

*B68*

Við hvørt er sjónligt, hvør luturin hjá einum botnliði er, og hendan lutin áttu sandoyingar sunnudagin.

Undan dystinum vóru boðini til sandoyingar, at veruligur stríðsvilji nú skuldi finnast fram, um bjargingarroyndin skuldi eydnast, og í mun til fleiri av seinastu dystunum, so livdi B71 upp til kravið hesaferð.

Frá fyrsta bríksli trýstu teir á B68, og tað tóktist bara vera ein spurningur um tíð, áðrenn bólturin fór í netið.

Tað eydnaðist eisini sandoyingum at skora, men tað var so ikki fyrr enn beint undan steðginum, at so var. Clayton Soares hevur kanska ikki gjørt so nógv um seg á máltindunum í ár, sum hann annars hevur gjørt, men fótbóltsevnini hevur hann støðugt prógvað. Og hann var eisini ískaldur, tá møguleikin beyðst við brotssparki.

Armarnir komu tó ikki niður, áðrenn B68 hevði svarað aftur. Teir góvu bóltin upp og fóru beint í álop, og so stóð 1-1 á talvuni. Og tað kundu sandoyingar á ongan hátt vera nøgdir um. Mett eftir møguleikum, so skuldi dysturin mest sum verið avgjørdur fyri steðgin, men ein blanding av góðum málmansspæli og vánaligum skotroyndum forkom tó flestu møguleikunum.

Eftir steðgin var søgan á leið tann sama. Toftamenn pakkaðu seg kanska enn betur saman nú, og fortreytirnar fyri hesum gjørdust ikki verri, tá sandoyingar við einum sjálvmáli gjørdu sær tilveruna enn truplari. Men við sínum næsta máli kundi Clayton Soares aftur kveikja vónina hjá B71.

Um ikkki annað, so bar hetta málið við sær, at B71 enn hevur møguleika at vinna seg fram um ÍF ella KÍ. Men treytirnar eru sum so rættiliga greiðar. Fyrst og fremst skal B71 vinna komandi heimadystin móti Víkingi. Og so er møguleiki fyri veruligum botnbraki, tá teir í seinasta umfarinum vitja hjá ÍF í Fuglafirði. Undan hesum skal ÍF inn á Toftir, og megna teir ikki at fáa stig í teirri uppgerðini verður taparin í seinasta umfarinum í Fuglafirði svartiper. Eisini kann B71 fara fram við KÍ, um hesir einki fáa burtur úr seinastu umførunum, men tann spurningin fáa sandoyingarnir so ikki gjørt tað allar minsta við sjálvir.

## Mugu bara vinna

Gudmund Nielsen hjá B71 var sjálvandi ikki nøgdur um úrslitið av dystinum sunnudagin, men við Útvarpið hjá Kringvarpinum segði hann, at enn liva teir í B71 í vónini um, at tað kann eydnast at bjarga tilveruni í deildini. - Eitt stig er altíð gott at fáa, men tað var ikki akkurát tað, sum vit fóru eftir. Vit vildu hava øll trý stigini. - Beint nú er tað sjálvandi ræðuliga súrt, men vit trúgva framvegis upp á møguleikan. Vit vóru klárt betra liðið í dag, og vit høvdu eisini nógvar møguleikar. Men teir skora tvey heppin mál, og vit klára so høast alt at bjarga tí eina stiginum, segði Gudmund Nielsen.

**-mørk**

